KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

# Klaksvíkar Býráð

**Dagfesting:** 19.09.2013 kl. 17:30
**Málnr.:** 13/00245

Nevndarlimir: Jógvan Skorheim, Steinbjørn O. Jacobsen, Gunvá við Keldu, Óluva Klettskarð, Jóhann Lützen, Kristian Eli Zachariasen, Signhild V. Johannesen, Eyðstein Ó. Poulsen, Elsebeth Mercedis Gunnleygdóttur, Atli S. Justinussen, Herfrí J. Sørensen,

Onnur: Tummas Eliasen, kommunustjóri
Protokollførari: Jensa Anthoniussen

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| | **Til viðgerðar** | |
| 21/13 | 13/00014 | Reglugerð um fulltrú til kommunalar bindingar, dagføring, sept. 2013 - leggja aftrat fulltrúarøki í grein 1 (ársroknskapur kommununnar) og broyta navn í grein 2 (viðv. arbeiðssáttmálum og keypssáttmálum um akfør, amboð v.m.) |
| 22/13 | 13/00811 | Broyting av byggisamtyktini fyri Kl. Komm. - Tekniski Stjórin |
| 23/13 | 13/00841 | Nevndir - broyting í kommunustýrisskipan Klaksvíkar kommunu (sept. 2013) - *fyrra viðgerð* |
| 24/13 | 11/00134 | Grunnurin Mentanarhúsið í Klaksvík - góðkenning av broyting í samtyktum fyri grunnin |
| 25/13 | 12/00151 | Nordisk Platform II, nýggj vinarbýarsamstarvsavtala |
| 26/13 | 13/00125 | Millum Hjalla - raðhús/grundøkir |
| 27/13 | 13/00176 | Endurskoðan av grundstykkjalistanum - broytingaruppskot |
| 28/13 | 13/00844 | Fíggjarætlan 2014 |
| 29/13 | 13/00616 | Marknaumskipan matr. nr. 786 og 753 |
| 30/13 | 13/00674 | Marknaumskipan - matr. nr. 1173 og 1176 |
| 31/13 | 13/00700 | Marknaumskipan - matr. nr. 758a og 758b |
| 32/13 | 13/00784 | Umsókn um matrikulering til eigaraíbúðir |
| 33/13 | 13/00347 | Tráðleyst net til Kunningarstovuna og Klaksvíkar bókasavn - *flytan millum høvuðskontur, fyrra viðgerð* |
| 34/13 | 13/00353 | Nýggj hølir til NR/Sernám - *flytan millum kontur, seinna viðgerð* |

| | | |
|---|---|---|
| 35/13 | 13/00610 | Kópakonan, Skúlin við Ósánna - *flytan millum høvuðskontur, fyrra viðgerð* |
| 36/13 | 13/00614 | Listprýði til kirkjukjallaran, Føroya Stiftsstjórn - *flytan millum høvuðskontur, fyrra viðgerð* |

## 21/13
## 13/00014 Reglugerð um fulltrú til kommunalar bindingar, dagføring, sept. 2013

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 17.09.2013 | 32/13 | |
| 2 Klaksvíkar Býráð | 19.09.2013 | 21/13 | |

**Frágreiðing um málið:**
Reglugerðin um fulltrú til kommunalar bindingar, ið seinast varð dagførd 29. jan. 2013, skal aftur dagførast. Hetta er fyrsta lagi í sambandi við, at nýggjur tekniskur stjóri, Karl Jakob Ósá, er settur. Í øðrum lagi hevur hetta samband við ynski um broyting í orðing í grein 1.

Broytingar (við reyðari skrift):

**§ 1**
*Tummas T. Eliasen, kommunustjóra*, verður givin fulltrú til – saman við *Jógvani Skorheim, borgarstjóra* – at undirrita skjøl fyri kommununa, sum hava við fastar ognir, lántøku og veðhaldsveitingar at gera umframt at undirskriva ársroknskap kommununnar.

**§ 2**
*Karl Jakob Ósá, tekniskum stjóra*, verður givin fulltrú til – saman við *Jógvani Skorheim, borgarstjóra* – at undirrita skjøl fyri kommununa, sum hava við arbeiðssáttmálar og keypssáttmálar um akfør, amboð v.m. at gera.

Sí annars hjálagda uppskot til dagførda reglugerð.

**Lógargrundarlag:**
Kommunustýrislógin § 44, stk. 2: "*skjøl viðvíkjandi keypi og sølu av fastari ogn o.t. skulu verða undirskrivað av borgarstjóranum og einum persóni, sum kommunustýrið hevur heimilað til tess*".
Sambært viðmerking til omanfyrinevndu lógargrein "*skal kommunustýrið tilnevna persónliga og við navns nevni medundirskrivaran hjá borgarstjóranum. Starvsheitið er ikki nøktandi*".

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ongar

**Tilmæli:**
Mælt verður til, at taka undir við broyttu orðingunum í dagførdu reglugerðini.

**FíN 17-09-2013:** Nevndin tekur undir við tilmælinum frá umsitingini, dagfest 20-08-2013.

**Býráðsins samtykt 19-09-2013:**
Tilmælið samtykt.

## 22/13
## 13/00811 Broyting av byggisamtyktini fyri Klaksvíkar Kommunu - Tekniski Stjórin

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska Nevnd | 11.09.2013 | 20/13 | |
| 2 Byggi- og Býarskipanarnevndin | 09.09.2013 | 5/13 | |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 19.09.2013 | 22/13 | |

**Frágreiðing um málið:**
Bygnaðarbroytingin, sum kommunan hevur samtykt, krevur, at almenna byggisamtyktin verður broytt. Talan er um smávegis broytingar, har heitið *Býarverkfrøðingurin* verður broytt til *Tekniski Stjórin*.
(í viðhefta byggisamtyktarteksti eru broytingar avmerktar við gulum)

**Lógargrundarlag:**
Almenn byggisamtykt fyri Klaksvíkar kommunu.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ongin.

**Tilmæli:**
Mælt verður til at taka undir við omanfyri nevndu broyting.

**BBN 09-09-2013:** Nevndin tekur undir við tilmæli frá Tekniska Stjóranum dagf. 5. september 2013.

**TN 11-09-2013:** Nevndin tekur undir við viðtøkuni hjá BBN, dagf. 09-09-2013.

**Býráðsins samtykt 19-09-2013:**
Tilmælið samtykt.

## 23/13
## 13/00841 Nevndir - broyting í kommunustýrisskipan Klaksvíkar kommunu (sept. 2013) - *fyrra viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 17.09.2013 | 31/13 | |
| 2 Klaksvíkar Býráð | 19.09.2013 | 23/13 | |
| 3 Klaksvíkar Býráð | **03.10.2013** | | |

**Frágreiðing um málið:**
Klaksvíkar Býráð samtykti á býráðsfundi 13. sept. 2012 eina bygnaðarbroyting fyri umsiting Klaksvíkar kommunu. Avgjørt varð, at umsitingin skuldi byggjast upp kring fýra økir - stjórnarskrivstovuna, trivnaðardeildina, vinnu- og mentanardeildina og teknisku deildina. Í hesum sambandi er avrátt, at fremja eina broyting í nevndarsamanseting býráðsins.

Í 6. kap. í Kommunustýrislógini (KSL) er viðv. nevndum ásett, at:

> **§ 28.** Settar skulu verða ein fíggjarnevnd og ein ella fleiri aðrar fastar nevndir til beinleiðis fyrisiting av kommunalum viðurskiftum. Nevndirnar skipa seg sjálvar, sbr. tó § 38, stk. 1, 2. pkt.
> *Stk. 2.* Val av limum og tiltakslimum til fastar nevndir fer fram beint eftir, at borgarstjóri og

varaborgarstjóri eru valdir. Valið fer fram eftir lutfalsvalháttinum sambært § 3.
*Stk. 3.* Hevur borgarstjórin ella annar nevndarformaður fastan sess í eini nevnd, verður hesin sessur taldur við upp í sessatalið, sum bólkur teirra hevur rætt at ogna sær.
*Stk. 4.* Verður avgjørt at velja nevnd av nýggjum, stendur øll nevndin fyri vali.

**§ 29.** Allir limir í føstu nevndunum skulu vera kommunustýrislimir.
*Stk. 2.* Kommunustýrisskipanin skal áseta nærri reglur bæði um manning og málsøki hjá teimum føstu nevndunum. Talið á nevndarlimum skal vera stakt, og tað skal vera minni enn helmingurin av øllum kommunustýrislimunum.
*Stk. 3.* Nærri reglur um nevndararbeiðið kunnu verða ásettar í eina fundarskipan.

Í 3. parti í Kommunustýrisskipan Klaksvíkar kommunu (KSSKK), sum seinast broytt 18. mai 2010, er viðv. nevndum ásett, at:

**§ 8.** *1. petti.* Til at taka sær av teirri beinleiðis fyrisitingini av viðurskiftum kommununnar verða skipaðar ein fíggjarnevnd og ein ella fleiri aðrar fastar nevndir.

Víðari stendur í 5. parti í KSSKK (18-05-2010) um føstu nevndirnar, at:
**§ 20.** *1. petti.* Hesar føstu nevndir skulu verða valdar:

1. Sosiala Nevndin
2. Tekniska Nevndin
3. Byggi- og býarskipanarnevndin
4. Mentunarnevndin
5. Havnanevndin

*2. petti.* Limirnir í teim í 1. petti umrøddu nevndum verða valdir millum býráðslimirnar

Uppaftur víðari stendur í 6. parti í KSSKK (18-05-2010) um aðrar nevndir (Heilsu- og Umhvørvisnevndina) at:
**§ 29.** *1. petti.* Heilsu- og Umhvørvisnevndin hevur 5 limir
*2. petti.* Nevndin fyrisitur mál, ið sambært lóggávuni, kunngerðum, reglum um umhvørvisvernd og fyriskipanum, eru løgd undir kommununa.

Nevndirnar - Fíggjarnevndin og føstu nevndirnar - verða ætlandi framyvir hesar:

- Fíggjarnevndin (FíN)
- Trivnaðarnevnd Børn & Ung (TrN B&U)
- Trivnaðarnevnd Eldri & Bústaðir (TrN E&B)
- Havna- & Vinnunevndin (HaVN)
- Mentanarnevndin (MeN)
- Tekniska Nevndin (TN)
- Byggi- & Býarskipanarnevndin (BBN)

Hjáløgd er dagførd kommunustýrisskipan pr. 2013-09-13, har hædd er tikin fyri omanfyrinevndu broyting av nevndunum. Hjálagt er eisini rokniark yvir býtið av rakstarstøðum hjá hvørjari einstakari nevnd.

**<u>Lógargrundarlag:</u>**
Kommunustýrislógin 6. kap. og Kommunustýrisskipan Klaksvíkar kommunu frá 18. mai 2010.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Í tann mun nevndarbroytingarnar føra til størri umsitingarligt arbeiði hjá nevndarlimunum, kann hugsast ein meirútreiðsla, men roknast kann ikki við munandi øktum útreiðslum.

**Tilmæli:**
Mælt verður til, at støða verður tikin til broytingarnar av nevndum og broytingarnar í kommunustýrisskipanini.

**FíN 17-09-2013:** Nevndin tekur undir við tilmælinum frá umsitingini, dagfest 12-09-2013, og gevur borgarstjóranum heimild at abeiða víðari við tillagingum til eyka býráðsfundin 3. okt. 2013.

**Býráðsins samtykt 19-09-2013:**
Tilmælið samtykt.

## 24/13
## 11/00134 Grunnurin Mentanarhúsið í Klaksvík - góðkenning av broyting í samtyktum fyri grunnin

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 17.09.2013 | 34/13 | |
| 2 Klaksvíkar Býráð | 19.09.2013 | 24/13 | |

**Frágreiðing um málið:**
Grunnurin Mentanarhúsið í Klaksvík hevur havt fund 4. sept 2013, har uppskot til broytingar í samtyktum grunsins varð viðgjørt og samtykt.

Hjálagdar eru broyttar samtyktir undirskrivaðar av stýrislimunum.

**Lógargrundarlag:**
Sambært grein 11 í samtyktunum grunsins, skulu samtyktarbroytingar góðkennast av Klaksvíkar Býráð.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ein mió. kr., sum er sett av til endamálið, verður at flyta í grunnin, so hann kann fáa sítt egna virki.

**Tilmæli:**
Mælt veður til at góðkenna broyttu samtyktir grunsins, undirskrivaðar av stýrislimunum 5. september 2013.

**FíN 17-09-2013:** Nevndin tekur undir við broyttu samtyktum grunsins.

**Býráðsins samtykt 19-09-2013:**
Tilmælið samtykt.

## 25/13
## 12/00151 Nordisk Platform II, nýggj vinarbýarsamstarvsavtala

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 10.09.2013 | 21/13 | |
| 2 Fíggjarnevndin | 17.09.2013 | 35/13 | |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 19.09.2013 | 25/13 | |

**Frágreiðing um málið:**
22. mars 2011 samtykti býráðið endurnýggjað uppskot til vinarbýaravtalu. Ætlanin var eisini, at skipast skuldi fyri eini felags undirskriving av avtaluni, har allir borgarstjórarnir hittust til hesa undirskriving. Ikki fyrr en nú er henda undirskriving komin í lag, og verður hon í Norrkøping á vinarbýarfundi 24. og 25. okt. 2013, har allir borgarstjórarnir hittast. Til kunnleika varð fyrra avtalan frá 1995 eisini undirskrivað í Norrkøping.
Avtalan frá 2011, sum var á donskum, er týdd til svenskt við sama innihaldi. Tó vildi táverandi borgarstjórin í Norrkøping, Li Teske - í 2012 - hava ta broyting í avtaluna, at hon skuldi eftirmetast/tillagast eftir 10 árum, ella tá ið ein av býunum ynskti tað.
Tí verður henda nýggja avtalan, sum nú verður undirskrivað, løgd fyri av nýggjum, so samsvar er við avtaluna, ið býráðið samtykkir í mun til tað, sum verður undirskrivað.

Alt tað, sum hevur virkað væl, heldur fram, men verður lagt upp til eitt meira opið og víðari samstarv. Ynskja tveir ella tríggir býir eitt ávíst samstarv t.d. innan universitetslesnað, so gera teir tað.
*Burðardygg samfelagsmenning, demokratisering, borgaraávirkan og umhvørvi* eru nøkur av felagsheitunum í nýggju avtaluni, har m.a. skúlasamnstarvið heldur fram.

**Lógargrundarlag:**
Vinarbýarsamstarv - Fíggjarætlanin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Skúlin hevur havt eina avseting á kr. 120.000,- Teir hava eitt rættiliga virkið skúlasamstarv bæði millum lærarar, børn (setursflokkar) og eisini hittast skúlaleiðararnir regluliga. Í kommunuhøpi hevur verið sett av kr. 50.000,-

**Tilmæli:**
Mælt verður til at taka undir við uppskoti frá 4. juli 2012 til vinarbýaravtalu - kallað Nordisk Platform II

**MeN 10-09-2013:** Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 27-08-2013.

**FíN 17-09-2013:** Nevndin tekur undir við MeN 10-09-2013.

**Býráðsins samtykt 19-09-2013:**
Tilmælið samtykt.

## 26/13
## 13/00125 Millum Hjalla - raðhús/grundøkir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska Nevnd | 11.09.2013 | 23/13 | |
| 2 Fíggjarnevndin | 17.09.2013 | 45/13 | |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 19.09.2013 | 26/13 | |

**Frágreiðing um málið:**
Í tráð við býráðsamtykt frá 21. februar 2013 lýsti kommunan seint í vár við sølu av 6 teimum sunnastu grundøkjunum omanfyri vegin Millum Hjalla til raðhúsabygging. Uppleggið var, at hetta skuldi vera tað fyrsta av fýra útbjóðingarøkjum, ætlað alternativari bygging Millum Hjalla, og at vanlig sethúsabygging framvið strekkinum skuldi fara fram niðanfyri vegin.
Freistin fyri at lata inn tilboð var 23. mai 2013, men ongi tilboð komu inn.
*(sí kort niðanfyri, har útbjóðingarøki I,II III og IV er litað ávikavist orange, rosa, blátt og lilla)*




**Lógargrundarlag:**
Ongar viðmerkingar

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Inntøka – alt eftir sølu av grundøkjum

**Tilmæli:**
Út frá teirri staðfesting, at ongin áhugi var fyri almenna útboðnum, og at tað í millumtíðini hevur víst seg áhugi fyri at keypa okkurt av grundøkjunum omanfyri vegin til vanliga sethúsabygging, skjýtur Tekniska Umsiting upp, at t.d. økið II við ómerktum grannaøkjum verður frígivið til vanliga sethúsabygging, meðan økini I, III og IV fyribils verða varðveitt til møguligar alternativar byggiætlanir.

**TN 11-09-2013:** Nevndin tekur undir við tilmælinum frá Teknisku Umsiting, dagfest 05-09-2013.

**FíN 17-09-2013:** Nevndin tekur undir við TN 11-09-2013.

**Býráðsins samtykt 19-09-2013:**
Tilmælið samtykt.

## 27/13
## 13/00176 Endurskoðan av grundstykkjalistanum - broytingaruppskot

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska Nevnd | 11.09.2013 | 24/13 | |
| 2 Fíggjarnevndin | 17.09.2013 | 46/13 | |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 19.09.2013 | 27/13 | |

**Frágreiðing um málið:**
Víst verður til tilmæli frá Teknisku Umsiting dagf. 9. apríl 2013 og eftirfylgjandi býráðssamtykt frá 24. apríl 2013, har samtykt varð at seta kostnað fyri upptøku á kommunala grundstykkja-bíðilistan. Kostnaðurin varð samtyktur at vera kr. 5000,-. Broytingaruppskot leggur nú upp til, at kostnaðurin í staðin verður kr. 2.500,-

**Lógargrundarlag:**
Ongar viðmerkingar

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Sí tilmæli frá 9. apríl 2013.

**Tilmæli:**
Sambært tilmæli frá 9. apríl, men verður lagt upp til nevndir og býráð at taka støðu til, um kostnaðurin skal vera kr. 5.000,- ella kr. 2.500,-

**TN 11-09-2013:** Nevndin mælir til, at kostnaðurin verður kr. 2.500,-.

**FíN 17-09-2013:** Nevndin tekur undir við TN 11-09-2013.

**Býráðsins samtykt 19-09-2013:**
Samtykt, at kostnaðurin verður kr. 2.500,-

## 28/13
## 13/00844 Fíggjarætlan 2014

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 17.09.2013 | 30/13 | |
| 2 Klaksvíkar Býráð | 19.09.2013 | 28/13 | |

**Frágreiðing um málið:**
Í niðanfyri standandi talvu er høvuðuskarmurin fyri fíggjarætlanina 2014 uppsettur. Rakstrarútreiðslurnar hækka 2 mió. kr. frá 104,8 mió. kr til 106,8 mió. kr. Tá er ikki hædd tikin fyri lønarvøkstri.

| Fíggjarætlan 2014 | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Kommunugrein | | | F. ætlan | F.ætlan | Roknskapur | | | |
| | | | 2014 | 2013 | 2012 | 2011 | 2010 | 2009 |
| | | Rakstrarútreiðslur | 106.774 | 104.761 | 100.718 | 98.837 | 94.685 | 86.301 |
| | | Rentustuðul | 5.500 | 5.430 | 5.368 | 4.842 | 5.212 | 5.885 |
| | | Fíggjarútreiðslur | 7.000 | 7.500 | 6.824 | 7.069 | 8.388 | 9.031 |
| §20 | | Inntøkur | -162.500 | -157.130 | -159.454 | -156.476 | -142.896 | -131.628 |
| | | Rakstrarúrslit | -43.226 | -39.439 | -46.544 | -45.728 | -34.611 | -30.411 |
| | | Íløgur tilsamans | 35.700 | 55.800 | 36.180 | 36.297 | 24.763 | 17.782 |
| | | Úrslit | -7.526 | 16.361 | -10.364 | -9.431 | -9.848 | -12.629 |

Lønarútreiðslurnar eru tilsamans áleið 73 mió. kr. og tí vil hvørt prosent í lønarvøkstri geva eina meirútreiðslu á leið 0,7 mió. kr. Um hædd verður tikin fyri teimum sáttmálabundnu lønarhækkingum og møguligum umflokkingum, verður henda meirútreiðsla áleið 0,8 -1,0 mio. kr.

Rentustuðulin er settur til 5,5 mió. kr og rentuútreiðslurnar til 7,0 mió. kr.

Inntøkurnar eru mettar til 162,5 mió. kr. Inntøkurnar vóru í 2012 159,5 mió. kr, og metingin fyri 2013 er, at inntøkurnar fyri 2013 verða umleiða 163 mió. kr.

Við hesum fyritreytum verður rakstrarúrslitið 43,2 kr. mió. kr. Íløgukarmurin er settur til 35,7 mió. kr., og úrslitið 7,5 mió. kr.

**Lógargrundarlag:**
Vísandi til kommunulógina við ásetingum um fíggjarætlan v.m

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmæli:**
Mælt verður til, at fíggjarnevndin tekur støðu til omanfyri standandi fíggjarkarm.

**FíN 17-09-2013:** Nevndin mælir til niðanfyristandandi útgangsstøði fyri fíggjarkarmin fyri komandi fíggjarár:

| | | |
|---|---|---|
| Inntøkur | 157,0 | mió. kr. |
| Rakstur | 104,0 | mió. kr. |
| | 53,0 | mió. kr. |
| Rentur | 7,0 | mió. kr. |
| | 46,0 | mió. kr. |
| Avdráttir | 7,0 | mió. kr. |
| | 39,0 | mió. kr. |
| Íløgur | 39,0 | mió. kr. |
| Javnvág | 0,0 | mió. kr. |

**Býráðsins samtykt 19-09-2013:**
Tilmælið samtykt

KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

## <u>29/13</u>
## <u>13/00616 Marknaumskipan matr. nr. 786 og 753</u>

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska Nevnd | 11.09.2013 | 25/13 | |
| 2 Klaksvíkar Býráð | 19.09.2013 | 29/13 | |

**<u>Frágreiðing um málið:</u>**
Eigararnir av matr. nr. 753 og 786 við Heygaveg 1 søkja um marknaumskipan sambært niðanfyri vísta korti.
Blá-litaða økið verður lagt afturat matr. nr. 753, meðan orange-litaða økið verður lagt afturat matr. nr. 768.

**<u>Lógargrundarlag:</u>**
Ongar viðmerkingar

**<u>Fíggjarligar avleiðingar:</u>**
Ongar – umsøkjarnir rinda sjálvir ummatrikuleringina

**<u>Tilmæli:</u>**
Tekniska Umsiting mælir til at senda Umhvørvisstovuni umsóknina við tilmæli um  góðkenning.




**TN 11-09-2013:** Nevndin tekur undir við tilmæli frá Teknisku Umsiting, dagfest 03-09-2013.

**<u>Býráðsins samtykt 19-09-2013:</u>**
Tilmælið samtykt.

## <u>30/13</u>
## <u>13/00674  Marknaumskipan - matr. nr. 1173 og 1176</u>

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska Nevnd | 11.09.2013 | 26/13 | |
| 2 Klaksvíkar Býráð | 19.09.2013 | 30/13 | |

**Frágreiðing um málið:**
Søkt verður um marknaumskipan í samband við breiðkan av tilkoyringarvegi til matr. nr. 1176, sum víst niðanfyri:




**Lógargrundarlag:**
Umsóknin er í tráð við galdandi matrikullóg

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ongar – umsøkjararnir rinda matrikulgjaldið

**Tilmæli:**
Tekniska Umsiting mælir til at senda Umhvørvisstovuni málið við tilmæli um góðkenning

**TN 11-09-2013:** Nevndin tekur undir við tilmæli frá Teknisku Umsiting, dagf. 26-08-2013.

**Býráðsins samtykt 19-09-2013:**
Tilmælið samtykt.

## 31/13
## 13/00700 Marknaumskipan - matr. nr. 758a og 758b

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska Nevnd | 11.09.2013 | 27/13 | |
| 2 Klaksvíkar Býráð | 19.09.2013 | 31/13 | |

**Frágreiðing um málið:**
Eigararnir av natr. nr. 758a og 758b í Klaksvík søkja um marknumskipan sambært kortinum niðanfyri, har reyða linjan er nýtt mark millum ognirnar

KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001




**Lógargrundarlag:**
Ætlanin er í trá við galdandi ásetingar um grundøkjavídd

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ongar – umsøkjarnir rinda matrikulútreiðslurnar

**Tilmæli:**
Tekniska Umsiting mælir til at senda Umhvørvisstovuni málið við tilmæli um at góðkenna marknaumskipanina.

**TN 11-09-2013:** Nevndin tekur undir við tilmæli frá Teknisku Umsiting, dagf. 26-08-2013.

**Býráðsins samtykt 19-09-2013:**
Tilmælið samtykt.

## 32/13
## 13/00784 Umsókn um matrikulering til eigaraíbúðir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska Nevnd | 11.09.2013 | 28/13 | |
| 2 Klaksvíkar Býráð | 19.09.2013 | 32/13 | |

**Frágreiðing um málið:**
Byggiloyvi varð útskrivað í oktober 2012, og umsókn um sundurbýti til eigaraíbúðir varð móttikin 4. juni 2013. Talan er um endurbygging av verandi húsum á ognini, tó - í mun til upprunabygging - bæði víðkað í vídd og hædd. Upprunahúsið umfataði handilshøli í veghædd við einari íbúð í 1. hædd. Nýggi bygningurin hevur handilshøli í veghædd við tveimum íbúðum í erva.

**Lógargrundarlag:**
Brunatekniskt uppfyllir byggingin ásettu krøvini til eigaraíbúðir. Grundøkið er 216 $m^2$. Byggisamtyktarliga krevst – við nýbygging - eitt parkeringspláss pr. 40 $m^2$/grundøki . Onki parkeringspláss er á ognini.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ongar viðmerkingar

**Tilmæli:**
Út frá teirri staðfesting,

- at talan partvís er um endurbygging av verandi húsum
- at – í tráð við byggisamtyktina – er grannahoyring farin fram í samband við samtykt undantaksloyvi av nýbyggingini.
- at bygningurin kann metast sum partur av miðstaðabyggingini

mælir Tekniska Umsiting til at játta undantaksloyvi frá parkeringskravinum, og tilmæla loyvi til sundurbýti til eigaríbúðir. Sum er, er parkering í parkeringslummunum tíðaravmarkað, og má umsøkjarin tola, at bilar knýttir til ognina parkera á opnum almennum parkeringplássum.

**TN 11-09-2013:** Nevndin tekur undir við tilmæli frá Teknisku Umsiting, dagf. 02-09-2013.

**Býráðsins samtykt 19-09-2013:**
Tilmælið samtykt.

## 33/13
## 13/00347 Tráðleyst net til Kunningarstovuna og Klaksvíkar Bókasavn - *flytan millum høvuðskontur, fyrra viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 17.09.2013 | 39/13 | |
| 2 Klaksvíkar Býráð | 19.09.2013 | 33/13 | |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 24.10.2013 | | |

**Frágreiðing um málið:**
Málið hevur verið til viðgerðar í HaVN og í MeN 16. apríl 2013, men ger bókhaldarin vart við, at meginreglan er, at av tí at *Vinnumenning* er undir § 7, skal málið hava tvær býráðsviðgerðir.
Útreiðslan skal bókast á rakstrarstaðið, har arbeiðið er framt - *Bókasavnið.*

Fígging:
kr. 15.000,- skal fíggjast av "*Ymisk tilboð/tiltøk mentan/frítíð*" og
kr. 15.000,- av "*Vinnumenning*".
Verandi mannagongd sigur, at vit eiga at flyta **játtanirnar** frá nevndu rakstrarstøðum til *Bókasavnið.*

Tvs. játtanirnar frá "*Ymisk tilboð/tiltøk mentan/frítíð*" og "*Vinnumenning*" skulu lækka við hvør sínum kr. 15.000,-, og játtanin til Bókasavnið hækka samsvarandi kr. 30.000,-

Av tí at Vinnumenning er undir § 7, skal málið hava tvær býráðsviðgerðir.

**Lógargrundarlag:**
Fíggjarætlanin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
kr. 15.000,- skal fíggjast av "*Ymiskur tilboð/tiltøk mentan/frítíð*" og
kr. 15.000,- av "*Vinnumenning*".
Játtanin til Bókasavnið hækkar samsvarandi við kr. 30.000,-

**Tilmæli:**
1 – at kr. 15.000,- verða fluttar av "*Ymiskur tilboð/tiltøk mentan/frítíð*" og
2 – at kr. 15.000,- av "*Vinnumenning*" – ***til***
*Klaksvíkar Bókasavn*
3 – at játtanin til Bókasavnið hækkar samsvarandi við kr. 30.000,-
4 – at av tí at *Vinnumenning* er undir § 7, skal málið hava tvær býráðsviðgerðir

**FíN 17-09-2013:** Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 03-09-2013.

**Býráðsins samtykt 19-09-2013:**
Tilmælið samtykt.

## 34/13
## 13/00353 Nýggj hølir til NR/Sernám - *flyting millum kontur, seinna viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Sosiala Nevnd | 10.09.2013 | 17/13 | |
| 2 Fíggjarnevndin | 17.09.2013 | 43/13 | |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 19.09.2013 | 34/13 | |

**Frágreiðing um málið:**
Flytingin millum kontur varð fyrru ferð samtykt av býráðnum 23-05-2013.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Tað eru avsettar kr. 60.000 til flytingina av NR/Sernám og kr. 40.000 til húsaleigu, hita og ljós. Umsitingin metir, at vit megna at halda okkum innan fyri hesa avseting í samband við flytingina.

Í málinum er viðlagt kostnaðarætlan fyri flytingina. Enn hava vit ikki fingið endaliga kostnaðin av uppsetan frá Nema og flytan av Landsnet, og tí er onki keypt enn, so at vit kunnu tryggja okkum at avsetingin heldur.

**Tilmæli:**
Kunnað verður um omanfyristandandi, samstundis sum biðið verður um seinnu samtykt av flytingum millum konto, sum fyrru ferð varð samtykt 23.05.13.

**SoN 10-09-2013:** Nevndin tekur undir við tilmæli frá Trivnaðardeildini, dagf. 04-09-2013 og mælir býráðnum til at gera seinnu samtykt av tilmæltu flytingunum millum kontur, sum vórðu samtyktar fyrru ferð av býráðnum 23-05-2013.

**FíN 17-09-2013:** Nevndin tekur undir við SoN 10-09-2013.

**Býráðsins samtykt 19-09-2013:**
Tilmælið samtykt.

## 35/13
## 13/00610 Kópakonan, Skúlin við Ósánna - *flytan millum høvuðskontur, fyrra viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 10.09.2013 | 24/13 | |
| 2 Fíggjarnevndin | 17.09.2013 | 36/13 | |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 19.09.2013 | 35/13 | |
| 4 Klaksvíkar Býráð | 24.10.2013 | | |

**Frágreiðing um málið:**
Listamaðurin Edward Fuglø hevur í summar gjørt eitt listaverk - Kópakonan - í Skúlanum við Ósánna. Við skúlaársbyrjan var hátíðarløta í skúlanum fyri næmingum og lærarum, og listaverkið varð alment sýnt fram fyri fyrstu ferð.

**Lógargrundarlag:**
Fíggjarætlanin.
Av tí at talan er um flytan millum tveir ymiskar kontobólkar 04 – *Mentan* til 05 - *Skúlan*, krevur flytingin tvær býráðssamtyktir.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Kr. 50.000,- verða fluttar frá «Kópakonan» til Skúlin við Ósánna dim. 154000 *Útbúnaður*.
Skúlin ber rokningina frá Edwardi Fuglø. Verkið er ogn skúlans.

**Tilmæli:**
1 - Kr. 50.000,- verða fluttar frá «Kópakonan» til Skúlin við Ósánna dim. 154000 *Útbúnaður*
2 - Skúlin ber rokningina, 25.08.13 frá Edwardi Fuglø
3 - Rokningin: 25.08.13. verður goldin nú beinanvegin
4 - Verkið er ogn skúlans

**MeN 10-09-2013:** Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 29-08-2013.

**FíN 17-09-2013:** Nevndin tekur undir við MeN 10-09-2013.

**Býráðsins samtykt 19-09-2013:**
Tilmælið samtykt.

## 36/13
## 13/00614 Listprýði til kirkjukjallaran, Føroya Stiftsstjórn - *flytan millum høvuðskontur, fyrra viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 10.09.2013 | 22/13 | |
| 2 Fíggjarnevndin | 17.09.2013 | 37/13 | |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 19.09.2013 | 36/13 | |
| 4 Klaksvíkar Býráð | 24.10.2013 | | |

**Frágreiðing um málið:**
Til kunnleika hevur Helgi Fossadal søkt býráðið um stuðul til eitt av listaverkunum hjá Edward Fuglø, *Jesus úr Nasaret*, sum eru sett upp í kirkjukjallaranum, í sambandi við at Christianskirkjan fylti 50 ár í summar. Honum er svarað, at málið verður tikið upp eftir summarsteðgin.

Avrátt varð í summarsteðginum, at fremja málið á samkomu sunnudagin 7. juli – í sambandi við at Christianskirkjan hátíðarhelt sín 50 ára føðingardag.
Jógvan Skorheim, borgarstjóri saman við formanninum í Mentanarnevndini, Signhild Johannesen hava rátt av at játta kr. 60.000,- til eitt av listaverkunum hjá Edward Fuglø, *Jesus úr Nasaret – Jesus mettar fimm-túsund fólk.*

Peningurin skuldi takast av "Klaksvíkar søgu", og málið skuldi verða lagt fyri nevndina til formaliseringar á fyrst komandi fundi eftir summarsteðgin.
Um tað vísir seg neyðugt at flyta pening inn aftur á "Klaksvíkar søgu", verður tað gjørt í sambandi við møguligar reguleringar av fíggjarætlanini í september.

**Lógargrundarlag:**
Fíggjarætlanin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Fluttar verða kr. 60.000,- av "*Klaksvíkar søgu*" til "*Annað hátíðarhald*"
Vit eru nú í september, og hevur Hans Andrias Sølvará enn ikki gjørt vart við, at hann er farin til verka við Klaksvíkar Søgu, tí væntast henda flyting ikki at hava fíggjarligar avleiðingar fyri "Klaksvíkar søgu".

**Tilmæli:**
At fluttar verða kr. 60.000,- av "*Klaksvíkar søgu*" til "*Annað hátíðarhald*", haðani keypið verður bókað.

**MeN 10-09-2013:** Nevndin tekur undir við tilmæli, dagf. 03-09-2013.

**FíN 17-09-2013:** Nevndin tekur undir við MeN 10-09-2013.

**Býráðsins samtykt 19-09-2013:**
Tilmælið samtykt.

**FRAMMANFYRI STANDANDI MÁL ERU VIÐGJØRD Á ALMENNUM FUNDI**